# Takk Óli

SÓLFRÍÐ HEINESEN
Norðragøta

Nú Ólasa tíð at mynda fiskimannafelagið er av, vil eg bera tær eina hjartans tøkk fyri at hava ment felagið til tað sum tað er í dag.

Ikki grunaði tað meg, nú tú ætlaði tær undir títt síðsta valskeið, at tú skuldi koma at liggja niðast.

Royndi nakrar ferðir undir valstríðunun at rógva upp undur, at tú mátti agitera ímillum fólkið. Men tú svaraði, at hatta var ikki tú, at ganga runt og selja teg sjálvan. Tú vildi hava eitt reelt val og skrivliga lýsa tann politikk, sum tú stóð fyri, so fiskimenn vistu, hvat teir høvdu at taka støðu til.

Óli, tú ert frá eini tíð, har eitt orð er eitt orð og maður er ein maður. Eg trúgvi hetta vísir, hvussu nógv vit hava flutt okkum samfelagsliga.

Óli, tú sigur, at tú leggur frá tær við góðari samvitsku, og eg trúgvi tað er tað, sum fer at standa eftir, tí ongun nýtist at ivast í, at tú gongur ikki upp á kompromi við tína samvitsku, og tað sum tú gongur uppí, har leggur tú lív og sál í.

Nú fiskimannablaðið er farið í søguna í tí líki, tað hevur havt, vil eg takka tær hjartaliga fyri tær mongu áhugaverdu greinar, sum hava havt sera stóran áhuga millum manna. Upplesan av blaðnun hevur verið fastur táttur á mongun sambýlum og ellisheimum.

Ikki minst vil eg takka tær fyri tey mongu minningarorðini, sum eg veit hava verið til stóra gleði og uggan fyri tey avvarðandi. Tey vísa, at sjálvt um tú ert ein maður við fáum orðum, hevur tú ein ótrúðligan áhuga og innlivan av tí einstaka.

Góði Óli, okkara samfelag hevur tørv á fólki við slíkum eginleikum í dag.

Guds signing víðari á lívleiðini.

# Minningarorð um FF-blaðið

ÓLI JACOBSEN



Fyrsta ítøkiliga úrslitið av formansskiftinum í FF er, at FF-blaðið ikki kemur út aftur, og at tey, sum hava goldið haldaragjald fyri 2007, fáa tað afturgoldið. Hervið er ein týdningarmikil partur av virkseminum hjá FF í mong ár avtikin.

Tað var longu í 1920, at formaður og skrivari í FF, Símun Pauli úr Konoy og Rasmus á Háskúlanum, mettu tað at hava stóran týdning, at felagið hevði eitt blað, sum kundi lýsa felagið úteftir. Úrslitið gjørdist FF-blaðið, sum kom út hvørja viku í 7 ár, inntil tað steðgaði vegna innanhýsis ósemju í felagnum.

Í 50-unum og 60-unum kom Fiskimannablaðið út nakrar ferðir, tó mest fyrstu árini. Tá eg gjørdist formaður í 1971 fór FF aftur undir FF-blaðið, tó nakað óregluliga fyrstu árini.

Síðan 1991 er FF-blaðið tó komið út regluliga 2. hvørja viku. Fystu 10 árini við Vilmundi Jacobsen sum blaðstjóra, og síðan havi eg sjálvur verið blaðstjóri og havi skrivað og útvegað meginpartin av tilfarinum.

FF-blaðið hevur øll hesi árini verið andlitið hjá FF úteftir. Roynt hevur verið at skapa eitt alment blað av áhuga hjá øllum borgarum, og hevur hetta fyri ein stóran part eydnast. Blaðið er komið rættiliga víða, m.a. eisini til skúlar og almennar stovnar.

Blaðið hevur fyrst og fremst lagt dent á felags- og fiskivinnutíðindi, og er tað er eisini sent umborð á skipini. Tískil eru fiskimenn regluliga kunnaðir um virksemið hjá felagnum og tess arbeiði fyri at verja teirra áhugamál.

FF-blaðið hevur eisini javnan havt eina óhefta lýsing av politisku skipanini og hevur kunnað víst á hópin av dømum um tað skipaða rættarloysið í landinum, sum er gingið útyvir borgararnar og tess feløgum. Fiskimenn og FF eigur eisini sín ríkiliga part av hesum.

**Blaðið hevur skapt virðing fyri Fiskimannafelagnum**

Ein týðandi partur av blaðnum hevur verið siðsøguligt tilfar, har størsti dentur hevur verið lagdur á søguna og samleikan hjá fiskimonnum og annars eisini hjá ”vanligum” fólki.

Blaðið hevur havt ein trúgvan lesaraskara, og nærum dagliga hava fólk sagt mær, at tey mettu FF-blaðið sum besta blað í landinum við sínum øðrvísi tilfari í mun til hini bløðini.

Eg havi eisini fingið viðurkenning frá so frægum monnum sum Erlingi Olsen og Thorvald Stoltenberg, sum hava verið millum fremstu politikkarar í Norðanlondum.

Tað er eingin ivi um, at FF-blaðið hevur skapt virðing og vælvild fyri fiskimannafelagnum, og tískil eisini fiskimonnum, millum fólk. Hetta er ikki minst komið til sjóndar í hesum døgum, har fólk í hópatali hava víst mær sín fulla stuðul og óbroytt fult álit.

Ítøkiliga virðið av blaðnum kann kanska ikki gerast upp í krónum, men hetta hevur avgjørt verið stríðið vert.

Arbeiðið við blaðnum hevur eisini givið mær sjálvum nógv. Eg eri komin í samband við ótrúliga nógv fólk, eisini uttanlands, og havi eisini bestu vinir millum hesi.

Vit hava havt nógvar einastandandi frásagnir. Helst tann besta og mest kensluborna var samrøðan við Honnu Ben-Yami um hennara lív sum týskur jødi undir nasismuni. Hon greiddi frá, hvussu nasistarnir fyrst tóku pápan og síðan mammuna. Ein dagin ringir systirin og sigur, at hon er rýmd undan nasistunum, men rópar so knappliga í telefonini: ”Nú komi teir, eg noyðist at fara”. Tá sigur Hanna í frásøgnini: ”Tá skilti eg, at nú var eg einsamøll eftir”, og hon var so rørd, at hon græt. Hetta var veruliga sum at gerast beinleiðis partur í heimssøguni heima í síni egnu stovu. Henda løtan hevur brent seg inn í mítt minni!

Mín vinskapur við Ben Yami hjúnini førdi tey til Føroyar seinasta summar. Frágreiðingin hjá Menakhem um fiskiskapin undir Føroyum, sum meira útgreinað hevur verið endurgivin í FF-blaðnum, hevur uttan iva hevur verið fiskimonnum til beinleiðis gagn í viðgerðini av fiskidøgum.

**Einsrætting av samfelagnum**

FF-blaðið hevur sum einasta blað tosað ”Roma mitt imot”. Hetta hevur verið so beinrakið, at ”almennu Føroyar” hava roynt at tiga blaðið í hel. Kortini er tað óalment fleiri ferðir váttað, at ”almenna skipanin” hevur havt respekt fyri blaðnum, og hevur tað eisini vist hava sína ávirkan í mun til um blaðið ikki var.

Tað er eingin ivi um, at Føroyar gerast eitt meira og meira einsrættað samfelag, sum vit eisini hava víst á. T.d. vísa royndirnar av FF-blaðnum, at tað gerst meira og meira trupult at geva út eitt samfelagskritiskt blað í Føroyum.

Eitt týðiligt tekin um hetta er, at tað hevur gingist verri og verri at fáa lýsingar, og uttan lýsingar kemur einki blað út.

Men her vil eg serliga takka Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Tað hevur øll árini havt hvørja ta einastu lýsing í FF-blaðnum eisini. Eg havi ikki viljað takkað teimum alment fyrr enn nú, so hevði nokk onkur gripið inn! Tað sama er at siga um SEV, sum skal fáa somu tøkk. Eg vil annars fegin takka øllum teimum lýsarum, sum hava hildið á til endan.

Hinvegin hava stovnar sum Løgmanskrivstovan og Toll og Skatt, sum upprunaliga lýstu í blaðnum, greitt avgjørt at boykotta blaðið við at steðga sínum lýsingum. Eg heitti seinasta heyst á aðalráðini um at gera ein lýsingarpolitikk, so almennu lýsingarnar vóru meira javnt býttar millum bløðini. Úrslitið tað beint mótsetta!

Eitt tað størsta vónbrotið er, at tað sama hevur verið galdani fyri Vinnuhúsið, hóast vit sum einasti miðil, tá á hevur staðið, hava vart eisini teirra sjónarmið t.d. í ætlanunum um almennu ”ræningina” av ALS.

**Stuðlarnir verða ikki við sviðið so**

Regluliga útgávan av FF-blaðnum kom at fevna um 15 ár og 383 bløð nú tað gevst. Hetta vísir, at felagið hevur havt ein førleika fram til formansskiftið, sum tað eisini hevði so langt aftur sum í 1920, men sum tað ikki hevur í dag. Ein førleiki, sum fiskimenn hvørki virðismettu tá ella nú.

Eg veit, at tey verða mong, sum koma at sakna FF-blaðið. Men tey verða kortini ikki heilt snýtt. Í FF-blaðnum náddi eg at hava fimm partar av hugtakandi søguni hjá 100 ára gamla fiskimanninum Andrias í Tarti í Oyndarfirði, og hevur henda frásøgnin verið stak væl umtókt. Tríggir partar eru eftir, og teir verða prentaðir í Sosialinum. Hvat annars verður kemur tíðin at vísa.

Á hendan hátt vóni eg framvegis at hava samband við tey, sum hava virðismett blaðið.

Eg vil eisini takka teimum hjartaliga sum so ella so hava víst hetta í orði og verki.

# Skattagrundarlagið hjá kommununum má takast upp nú

JÓGVAN VIÐ KELDU
løgtingsmaður í Norðoyggjum



**Var lønin hjá borgaranum t.d. í Sunda Kommunu tann sama, sum hjá Havnarborgaranum, hevði Sunda Kommuna 6 mió. fleiri í kassanum, meðan Tórshavnar Kommuna hevði 70 mió. krónur færri til íløgur og rakstur, um inntøkan lá á hædd við borgaran í Sunda Kommunu**

Eins og onnur samfeløg, eru Føroyar fyri støðugari broyting bygnaðarliga. Tað hevur við sær at meiri nágreiniliga má ansast eftir fíggjarliga grundarlagnum í ymisku tættunum, t.d í býtinum millum land og kommunur og kommunanna millum. Hetta hevur verið, er og verður tógvið stríð millum ymsu partarnar, og stríð verður neyðugt.

Hyggja vit at londunum uttan um okkum økist fólkaflytingin til størru plássini. Í Íslandi og Føroyum serliga til høvuðsstaðin.

Fíggjarliga grundarlagið hjá eini kommunu er meiri nú enn áður avgerandi fyri, um hon hóðrar undan í longdini. Latið okkum eisini síggja í eyguni, at fleiri og fleiri økir eru og verða løgd til kommunurnar at røkja, og til hetta skal peningur.

Menningin hjá eini kommunu verður alt eftir, um hon kann roknast sum eitt “heildar-samfelag”, t.v.s. um allir grundleggjandi tættir sum vinna, skúli, mentan, almenn arbeiðspláss, heilsu og sosialtænasta, barna- og eldraansing etc. eru har. Neyðugt er tí við sterkum økjum.

**Eyðsýndur munur**

Lat okkum hyggja at árligu lønarútgjaldingunum hjá sjey størstu kommununum, fyri hvønn persón sær, síggja vit, at ein kommuna skarðar eygsýniliga framúr; Tórshavnar kommuna við 191.000 krónum fyri hvønn íbúgva. Ein liggur langt aftanfyri hinar, nevniliga Vágs kommuna, við 143.000 krónum. Her er bert talan um A-inntøkur. Fyritøkur eru ikki íroknaðar. Tá eru tølini umleið hesi fyri hvønn persón sær:

| | |
|---|---|
| Tórshavnar Kommuna: | 191.000 |
| Klaksvíkar Kommuna: | 167.000 |
| Runavíkar Kommuna: | 166.000 |
| Tvøroyrar Kommuna: | 160.000 |
| Fuglafjarðar Kommuna: | 168.000 |
| Sunda Kommuna: | 172.000 |
| Vágs Kommuna: | 143.000 |

Lat okkum taka eitt hugsað dømi: Um borgarin í Sunda Kommunu, sum liggur næst Havnini í inntøku, hevði somu inntøku, sum ein havnarborgari, hevði Sunda Kommuna í kommunuskatti havt ikki færri enn einar 6 mió. krónur fleiri til íløgur og rakstur. T.v.s. 51 mió krónur heldur enn 45 mió. krónur.

Hinvegin kann vísast á, at um borgarin í Tórshavnar Kommunu hevði somu inntøku, sum borgarin í Sunda Kommunu, lá Tórshavnar kommuna við 70 mió. krónum færri.

**Hvat sigur politiski myndugleikin**

Einki er at siga til, nú ein dagin orðaskifti var í løgtinginum, at janvnartingmaðurin Kristian Magnussen tók so hvassliga til: “Hvat vilja øll hesi fólkini í Havnini”? – Ja, soleiðs kann ein spyrja. Svarið er einfalt, men tíverri tykist tyngri at ganga við til broytingar rætta vegin.

Her er bert ein av nógvum vinklum. Lat meg siga, at tølini eru á leið.

Mær kunnugt hava alment ongantíð verið gjørdar útgreiningar, kanningar og enn minni staðfestingar hesum viðvíkjandi hvørki av Landsbankanum, Fíggjarmálaráðnum ella Búðskaparráðnum. Heldur ikki havi eg sæð, hvussu hesir stovnar nágreinliga hugsa sær eina veruliga broyting av býtinum millum land og kommunur.

Vit sum landspolitikarar hava ábyrgd og møguleikar fyri at venda hesi gongd!

(Triðja greinin av í alt fimm)
www.keldu.com
keldu@post.olivant.fo